# Multicultural Week

Fjølmentanarvikan

**2023**

## Hugskotskjátta

# Fjølmentanarvika 2023

## Hvat er ein fjølmentanarvika?

Fjølmentanarvikan er ein mentanarvika, ið hevur sum endamál at fagna, fevna og varpa ljós á mentanarliga fjølbroytnið í føroyska samfelagnum. Á enskum eitur átakið *Multicultural Week*.

Í fjør varð á fyrsta sinni skipað fyri Fjølmentanarviku fyri alt Føroyar. Hugskotið er sprottið burturúr Diversity week, ið áður hevur verið hildin í Tórshavnar kommunu. Ætlanin er, at fjølmentanarvikan verður eitt afturvendandi átak, og at flest allar kommunur gerast partur av átakinum, eftir førimuni. Enska heitið fyri Fjølmentanarvikuna er Multicultural week.
í August 2023, búðu 54.601 fólk í Føroyum.

## Visti tú:

**– at 3.208 fólk ið búgva í Føroyum ikki hava danskan ríkisborgaraskap**
**– at íbúgvarnir í Føroyum eru fødd í 132 ymiskum londum í heiminum.**

## Kom við!

Okkara vón er at kommunur, frítíðarfelagsskapir, skúlar, áhugafeløg og einstaklingar annars, hava hug at luttaka og skipa fyri tiltøkum hesa vikuna. Vit hava í hesum sambandi framleitt eina hugskotsjáttu, ið kann nýtast sum íblástur.

Tað stendur til tykkum, hvat ið tykkara íkast verður. Einasta ynski er, at tiltøkini fagna, fevna og varpa ljós á fjølmentanina í Føroyum.

## Hvat er ein hugskotskjátta?

Hugskotskjáttan er eitt savn av ymiskum virksemi, átøkum og spølum, ið kunnu nýtast í sambandi við fjølmentanarvikuna.

Í hugskotsskjáttuni finnast ítriv, ið kunnu nýtast í skúlahøpi, barnagarðshøpi, ítróttarhøpi, almennum høpi, á arbeiðsplássum og í frítíðarfelagsskapum annars.

Endamálið við hugskotskjáttuni er, at tey luttakandi hava tað stuttligt saman og grunda á mentanarligt fjølbroytni í Føroyum.

## Hvussu nýta vit hugskotskjáttuna?

Hugskotskjáttan er býtt upp í tveir høvuðspartar: *stovnar, arbeiðspláss og felagsskapir* og *børn og ung*. Í fyrra partinum eru uppskot til tiltøk og átøk, sum kommunur, arbeiðspláss og felagsskapir kunnu vera karmur um. Í seinna partinum eru uppskot til spøl og annað virksemi til allar aldursbólkar.

Hugskotskjáttan leggur upp til, at lærarar, námsfrøðingar, venjarar og onnur, ið varða av børnum og ungum, kunnu nýta hugskotini í sambandi við undirvísing, venjing og toymisvirksemi av ymiskum slag. Vaksin eru eisini vælkomin at nýta spøl ella virksemi úr hesum partinum.

## Góð ráð

Broytingar henda ikki frá degi til dags. At arbeiða við mentanarfjølbroytni er eitt áhaldandi arbeiði, ið krevur ágrýtin fólk og góða tilrættalegging. Einstaklingar og felagsskapir mugu vera fyrireikað til at gera okkurt øðrvísi, enn tey plaga. Eitt nú eisini at kunna samskifta á øðrum málum enn føroyskum.

Tað er ikki *ein* rættur framferðarháttur, og henda hugskotskjáttan er eitt savn av hugskotum til, hvat kann gerast fyri at fagna og fevna fjølbroytnið í landinum og harvið fáa meira millummentanarliga vitan og tolsemi. Hóast vit á nógvan hátt eru ymisk, so eru vit felags um flest øll grundleggjandi virðir.

Góð ráð til tey, ið arbeiða við ungum fólkum og børnum úr tilflytarabólkum:

- Hóast tvey fólk eru úr sama minnilutabólki, so er ikki vist, at tey hava nakað til felags ella finna út av tí saman.

- Legg dent á felags eyðkenni, og at øll ung eru einstaklingar, hvør upprunin so er.

- Ung fólk hava fleiri samleikar, alt eftir umstøðum. Umframt at vera „útlendingar“, so kunnu tey eisini vera til dømis: beiggi, kvinna, tónleikari, bókormur, sangari, dansari, hondbóltspælari ella ein, ið elskar Game of Thrones. Tí er týdningarmikið ikki bert at leggja dent á ein tátt av teirra samleika, hugsa heldur um, hvat tey halda vera týdningarmikið.

- Verið varin, tá ið tit brúka heitir, tað kann kennast stigmatiserandi.

- Tað kann vera stórur munur á at vera tilflytari og at vera flótti. Tað er ikki vist, at flóttar hava hug til at tosa um eitt nú kríggj.

Búmerki: Deko&Prent

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

# Innihaldsyvirlit

## Partur 1

### Almennir stovnar, arbeiðspláss og felagsskapir 1


Kommunur ... 3
Tiltøk ... 4
Arbeiðspláss ... 5
Leiðsla og HR ... 5
Starvsfólkatiltøk ... 5
Frítíðarfelagsskapir ... 6
Nevndararbeiði ... 6
Matstovur, kaffihús og skeinkistøð ... 9
Mentanarhús o.a. ... 10
Framførslur ... 11
Framsýningar ... 11
Hugnakvøld ... 11


## Partur 2

### Børn og ung 13

#### Rørsla


Dansimálspæl á swahili ... 15
Føroyskur dansur ... 16
Kho kho ... 17
Virðisspæl ... 19
Hvar er mynturin? ... 20
Jerusalema Dance Challenge ... 21
Tinikling ... 22
Fjølmentanarbingo ... 24
Minnisspæl ... 25
Matur ... 26
Málspæl ... 27
Søgur og sagnir ... 27
Duolingokapping ... 27
Kahootkapping ... 28
Kafé Lingua ... 28
Kanningararbeiði ... 28
Bøkur ... 28
Heimurin ... 28
Stavrøð ... 29

## Skapa

Vit gera list saman ........ 31
Myndir ........ 31
Tónleikur ........ 31
Dansur ........ 32
Sjónleikur ........ 32
Framførslur ........ 32

## Øll

Hugnakvøld ........ 35
Heimablídni ........ 35
Orðaskifti ........ 36

## Skjøl 37

Innbjóðing til
fjølmentanartiltak ........ 37
Lat okkum byrja! ........ 38
Skreytskjal ........ 39

# Partur 1

# Almennir stovnar, arbeiðspláss og felagsskapir

Kommunur, arbeiðspláss og felagsskapir eru týdningarmiklir viðspælarar til at skapa eitt gott, fjølmentanarligt umhvørvi. Í kommununi, á arbeiðsplássum og í felagsskapum er góður møguleiki at tryggja góða vegleiðing, at lofta avbjóðingum og boða frá møguleikum, ið tilflytarar úr øðrum mentanum hava tørv á at vita. Fjølmentanarvikan er eitt gott høvi at varpa ljós á hesi viðurskifti. Her eru nøkur uppskot til átøk innanhýsis í kommununum, á arbeiðsplássum og í felagsskapum og nøkur uppskot til tiltøk, ið kommunur, arbeiðspláss og felagsskapir kunnu veita karmar um í fjølmentanarvikuni. Vinarliga takið myndir av tiltøkunum og legggi út við **#fjølmentanføroyar** ella **#multiculturalweek**. Um tiltøkini eru almenn, so sendið endiliga inn á **fjolmentan@gmail.com**, so koma tey á skránna.

## Leikluturin hjá kommunum

Kommunurnar kring landið eru størstu viðspælarar, tá ið tað snýr seg um at tryggja góðan fjølmentanarsið í Føroyum. Kommunan er oftast tað fyrsta staðið saman við Útlendingastovuni, ið fólk úr øðrum londum venda sær til, tá ið tey flyta til Føroyar, og er eisini tann stovnur, ið hevur vitan um samansetingina av mentanarliga fjølbroytninum í ymisku økjunum kring landið. Fjølmentanarvikan leggur upp til, at kommunur luttaka í fjølmentanarvikuni eftir førimuni, og vónandi eisini, at kommunur samstarva um sín leiklut á fjølmentanarøkinum í Føroyum.

## Leikluturin hjá arbeiðsplássinum

Í sambandi við fjølmentanarvikuna er hugsanin, at hvørt leiðslan skipar fyri onkrum, og/ella um starvsfólk sjálvi skipa fyri onkrum, so ræður um at vera við. Hvørt tiltøkini eru stór ella smá, er heldur ikki av alstórum týdningi, men heldur at tikið verður við onkrum av uppskotunum, og at tað verður ein jalig uppliving hjá teimum luttakandi. Í hesum partinum eru nøkur uppskot til, hvat leiðsla, HR og starvsfólk kunnu leggja dent á hesa vikuna.

## Leikluturin hjá frítíðarfelagsskapinum

Frítíðarfelagsskapir hava stóran leiklut í at tryggja, at bæði venjarar og limir kenna seg hoyrdar og virdar. Ikki er altíð neyðugt at samskipa tey heilt stóru tiltøkini, og í sambandi við fjølmentanarvikuna er hugsanin, at hvørt nevndin skipar fyri onkrum, og/ella um limirnir sjálvir skipa fyri onkrum, so ræður um at vera við. Í hesum partinum eru nøkur uppskot til, hvat nevnd, venjarar og limir kunnu gera hesa vikuna.

## Skúlar

Skúlar hava ein sera stóran leiklut, tá ið um ræður at styrkja tilvitanina um fjølmentan í samfelagnum. Skúlin kann vera við til at skapa eitt umhvørvi, har ið vitan um umheimin aðrar metanir styrkist

Hettar eru evni ið fólkaskúlin frammanundan arbeiðir við í nógvum fakum. Í samband við fjølmentanarvikuna, liggur ræði fyri hjá skúlunum at leggja dent á fjølmentan í Føroyum. Tá undirvísarin skapar tryggar karmar fyri næmingarnar, tá gerst lættari hjá nýtilflutta næminginum at kenna seg sum ein part av flokkinum, skúlanum og samfelagnum.

Undirvísarin kann gera nógv fyri at eggja til jaligt forvitni um fjølmentan á ein stuttligan hátt. Á fylgjandi síðum eru ymisk dømi um spøl, aktivitetir og kjakevnir. Vónandi finnur tú onkursvegna íblástur til eina fagna Fjølmentan á tykkara skúla. Tit eru eisini vælkomin at senda okkum tykkara góðu hugskot, soleiðis at onnur kunnu fáa gleði av teimum til næstu fjølmentanarviku.

# Kommunur

## Innanhýsis átøk

Fjølmentanarvikan er eitt gott høvi hjá kommunum at endurskoða mannagongdir í samband við tilflytarar. Her eru nøkur dømi um hvat kommunan kann arbeiða við innanhýsis.

- Hvussu verða tilflytarar móttiknir í kommununi og á stovnunum ið kommunan varðar av?
- Er kunningin til tilflytarar nóg góð?
- Er kunning á enskum ella øðrum málum?
- Hvat eru teir vanligastu spurningarnar í samband við tilflyting?
- Eru ábyrgdarfólk ið varða av at vegleiða tilflytarar í kommununi?
- Hvør kunning er á heimasíðuni hjá kommununi. Er kunningin eisini á enskum?

Um kommunan hevur ein integratiónspolitik, hvat er status á økinum. Gott høvi at kann hvørji mál eru rokkin.
Hevur kommunan ikki ein politik, er Fjølmentanarvikan eitt høvi til at tosa um hvørjar visiónir kommunan hevur á økinum.

## Viðurkenning

Fjølmentanarvikan kann vera eitt høvi til at kommunan heiðrar ávísan persón fyri teirra arbeiði. Tað kann eitt nú vera ein viðurkenning fyri at hava gjørt eitt átak, ella hava víst tilflytarum serligan ans. Tað kann hinvegin eisini vera at kommunan ynskir at heiðra ein av sínum borgarum við tilflytarabakgrund, eitt nú fyri at hava gjørt mun ella havt serligan týdning fyri lokalsamfelagið. Kommunan vil møguliga heiðra ávísan persón, ella bólk, ið hevur víst tilflytaraøkinum serligan ans.

## Tilfar

Viðheftir eru tríggir bóklingar: Tann fyrsti er til kommunalar móttøkur á tilflytaraøkinum, tann næsti er um týðandi tættir í sambandi við dagstovnaøkið og tilflyting og tann triði er um tvímæltar næmingar í fólkaskúlanum. Í bóklinginum um dagstovnaøki eru bæði spøl og venjingar til starvsfólk og hjálparfólk, ið kunnu nýtast til fjølmentanarvikuna ella gjøgnum árið annars.

https://d1d6zxt0xmx99c.cloudfront.net/media/2031/veglei%C3%B0ing-til-sf-%C3%AD-k-m-munag%C3%B3%C3%B0ar-mannagongdir.pdf
(Munagóðar mannagongdir).

https://integration.fo/upload/files/tydandi-taettir-i-namsfrodiligum-arbeidi-vid-fleirmaeltum-bornumpdf_a7f9e2a2afb142ffb813518dbfb2c72303e084aa.pdf
(Týðandi tættir í námsfrøðiligum arbeiði við fleirmæltum børnum).

https://integration.fo/upload/files/boklingur-um-tvimaeltar-naemingar-i-foroyska-folkaskulanumpdf_816be0bf05fc abbaa35706c70a5fc8b0d1b7db87.pdf

(Tvímæltir næmingar í føroyska fólkaskúlanum).

# Tiltøk

Her eru nøkur uppskot til almenn tiltøk, ið kommunan kann skipa fyri

## World Food

Matbásar, har fólk kunnu koma at royna ella keypa mat úr øðrum londum. Útlendingar búsitandi í Føroyum verða boðin at hava básar, har ið matur úr teirra heimlandi/mentan verður seldur, ella smakkiroyndir latnar ókeypis til vitjandi. Til ber eisini at loyva matstovum, ið gera mat, ið er inspireraður úr útlondum, at hava sølubás ella smakkiroyndir.

## Flagga við ymiskum fløggum

Prýðið býin/bygdirnar við fløggum úr ymiskum londum. Tit kunnu eitt nú kanna, hvørji lond eru umboðað í tykkara kommunu, og flagga við teimum.

## Gongutúrur

Gongufeløg kunnu skipa fyri túrum, har øll kunnu tekna seg. Ferðaleiðari kann greiða frá ymiskum lokalum støðum og søgum. Minnist til tulk ella ferðaleiðara, ið tosar enskt.

## Almennur dansur

Kommunan kann bjóða til dans við fjølmentaðum tónleiki.

## Konsert

Kommunan kann skipa fyri konsert við tónleiki úr øðrum heimspørtum.

## Felags morgundrekka

Drekkamuður í bygdarhúsi, tilhaldi, pensionistafelag, svimjihøll ella líknandi.

## Stuðul til tiltøk

Eitt gott hugskot er, at kommunan játtar stuðul til tiltøk (ella aðra framleiðslu), ið hava Fjølmentan sum tema. Slík játtan kundi verið tøk alt árið, sum partur av integratiónspolitikkinum hjá kommununi.

## Arbeiðspláss

Fjølmentanarvikan er eitt gott høvi til at varpa ljós á mentanarligt fjølbroytni á føroyskum arbeiðsplássum. Arbeiðspláss hava stóran leiklut í at tryggja góðan mentanarligan fjølbroytnisið í Føroyum og kunnu gera nógv fyri at tryggja, at starvsfólk kenna seg hoyrd og vird. Ikki er altíð neyðugt at samskipa tey heilt stóru tiltøkini, og í sambandi við fjølmentanarvikuna er hugsanin, at hvørt leiðslan skipar fyri onkrum og/ella um starvsfólk sjálvi skipa fyri onkrum, so ræður um at vera við. Hvørt tiltøkini eru stór ella smá, er ikki av alstórum týdningi, men heldur at tað verður ein góð uppliving hjá teimum luttakandi. Her eru nøkur uppskot til, hvat leiðsla, HR og starvsfólk kunnu leggja dent á hesa vikuna.

## Leiðsla og HR

Spurningar, ið HR ella leiðsla kunnu seta sær:

- Hvussu er arbeiðsplássið samansett? Í hvønn mun umboða vit fjølbroytni í føroyska samfelagnum?
- Kunnu vit sum arbeiðspláss gera meira fyri at fevna og gagnnýta mentanarliga fjølbroytni í okkara samfelag?
- Hava vit góða kunning til fólk, ið ikki skilja føroyskt?
- Eru serlig fyrilit, ið vit skulu hava fyri starvsfólkum, ið ikki kenna føroyska mentan og føroyskt mál?
- Hava vit mannagongdir ella starvsfólkapolitikki viðvíkjandi evnum um mentanarliga fjølbroytnið?
- Hvussu orða vit okkara starvslýsingar?
- Ber til at lesa starvslýsingarnar á enskum?
- Hevði tað verið gagnligt við eini mentorskipan tá tilflytarar verða settir í starv?

At taka væl ímótir nýggjum arbeiðsfelaga, ið er flýddur undan kríggi.

https://integration.fo/tilfar

## Starvsfólkatiltøk

- Útlendskt starvsfólk kann hava framløgu um eitt nú, hvussu tað er at starvast á føroyska arbeiðsmarknaðinum.
- Fjølmentanarligur døgurðatími. Royn mat í døgurðatímanum úr teimum mentanum, ið eru umboðaðar á staðnum.
- Bjóða til starvsfólkakvøld við tónleiki, søgum ella dansi úr øðrum mentanum enn tí føroysku.

- Spurnakapping við fjølmentan sum tema.

- Ítróttardagur við ítróttargreinum úr øðrum mentanum.

- Skipa fyri innanhýsis myndakapping. Luttakarar skulu senda inn myndir av einum hvørjum, ið lýsir fjølmentanina í Føroyum. Sendið tær bestu myndirnar inn á **#fjølmentanføroyar**.

- Viðurkenning. Arbeiðsplássið vil møguliga heiðra ávísan persón, ella bólk, ið hevur víst tilflytaraøkinum serligan ans.

## Frítíðarfelagsskapir

Fjølmentanarvikan er eitt gott høvi til at varpa ljós á mentanarligt fjølbroytni í føroyskum frítíðarfelagsskapum. Frítíðarfelagsskapir hava ein stóran leiklut í at tryggja góðan mentanarligan fjølbroytnissið í Føroyum og kunnu gera nógv fyri at tryggja, at bæði venjarar og limir kenna seg hoyrdar og virdar. Ikki er altíð neyðugt at samskipa tey heilt stóru tiltøkini, og í sambandi við fjølmentanar-vikuna er hugsanin, at hvørt nevndin skipar fyri onkrum, og/ella um limirnir sjálvir skipa fyri onkrum, so ræður um at vera við. Hvørt tiltøkini eru stór ella smá, er ikki av alstórum týdningi, men heldur at tað verður ein góð uppliving hjá teimum luttakandi. Her eru nøkur uppskot til, hvat nevnd, venjarar og limir kunnu leggja dent á hesa vikuna.

## Nevndararbeiði

Spurningar, ið nevndin kann seta sær:

- Hvussu er felagið samansett viðvíkjandi mentanarligum fjølbroytni?
- Í hvønn mun umboða vit mentanarliga fjølbroytnið í føroyska samfelagnum? Kunnu vit sum felagsskapur gera meira fyri at fevna og gagnnýta mentanarliga fjølbroytni í føroyska samfelagnum?
- Hava vit góða kunning til fólk, ið ikki skilja føroyskt?
- Eru serlig fyrilit, ið vit skulu hava fyri limum, ið ikki kenna føroyska mentan og føroyskt mál?
- Hava vit mannagongdir ella starvsfólkapolitikk viðvíkjandi evnum um mentanarliga fjølbroytnið?

### Hygg at tykkara limalista

Avspegla limirnir samfelagið, vit liva í? Eru lutfalsliga eins nógvir limir, ið eru til-flytarar ella úr tilflytarafamiljum? Ella kunnu vit gera meira fyri, at limatalið avspeglar samfelagið? Royndir vísa, at tilflytarar ikki í eins stóran mun luttaka í frítíðarvirksemi. Kanska hava vit hug at fáa fleiri børn við útlendskum foreldrum at gerast limir hjá tykkum? Hvussu kunnu vit arbeiða við tí málsetninginum?

## Hvussu lýsa tit við tilmelding og venjingartíðum?

Fjølmentanarvikan er eitt gott høvi til at lýsa við tykkara virksemi á enskum ella øðrum málum. Kanska eru fleiri limir, ið vilja koma upp í tykkara felagsskap, men kenna ikki tykkara virksemi og hvussu nógv limagjald tey skulu rinda, og vita ikki, hvussu tey melda seg til.

## Ítróttafelagsskapir

Bjóða einum við útlendskari bakgrund at koma við til venjing/fund hesa vikuna at greiða frá síni mentan. Spæl eitt spæl frá teirra landi sum upphiting áðrenn ella sum part av venjingini.

Á heimasíðu, í limabrøvum, á facebook og aðrastaðni kunnu tit seta fokus á eitt nú útlendskar spælarar ella venjarar hjá felagnum ella hava samrøðu við útlendsk foreldur.

## Limakvøld/-dag við denti á fjølmentan

Eitt nú kunnu útlendskir venjarar, undirvísarar ella limir hava eitt upplegg ella læra frá sær spøl og annað úr sínum heimlandi. Eitt hugskot er at hava limadag við denti á fjølmentan.

## Ítróttur

Tykkara ítróttarfelag kann skipa fyri einum hugnakvøldi har tit kunnu skipa fyri fifakapping, spurnakapping ella annað, har kappast verður um vitan um eitt nú fótbólt og spælarar úr øðrum londum. Til ber eitt nú at gita fløgg, ella úr hvørjum landi eitt lið ella spælari er. Gott hevði eisini verið, at fingið leikarar úr øðrum londum at koma at greiða frá, hvussu tað er at vera ítróttarfólk í teirra heimlandi.

Tit kunnu hava eina ítróttarkapping við yngru limunum, har tey skulu umboða hvør sítt land (OL kapping). So kunnu tey mála andlitsmáling í flagglitunum, hoyra tjóðsangin fyri tað landið og tílíkt. Til venjingarnar ta vikuna kunnu tit fáa onkur stuttlig spøl á venjingarætlanina, ið stava frá øðrum londum.

## Frítíðarfelagsskapir

Eru tit í einum frítíðarfelagsskapi fyri vaksin, er Fjølmentanarvikan eisini eitt gott høvi at gera okkurt serligt burtur úr. Her eru nøkur dømi um aktivitetir:
Tit kunnu læra at gera mat úr einum øðrum landi, læra eitt handverk úr einum øðrum landi, hoyra ella spæla útlendskan tónleik ið tit vanliga ikki hoyra ella spæla ella eitt nú hoyra um siðir og mentan hjá einum av tykkara limum ið hevur eina tilflytarabakgrund.

## Viðurkenning

Ein háttur at gera nakað serligt burtur úr í sambandi við fjølmentanarvikuna í tykkara felagsskapi, er at heiðra ein ávísan persón ella bólk, ið hevur víst

tilflytaraøkinum serligan ans. Ella tit hinvegin vilja heiðra ein tilflytara, ið hevur stóran tydning fyri tykkara felagsskap. Ein slík viðurkenning kann gerast á ymiskan hátt. Tit velja sjálvi um tit ynskja at innstillingar koma inn, ella um nevndin velur hvønn tey vilja heiðra. Hetta kann gerast til eitt serligt høvi, eitt nú tá felagsskapurin hevur aðalfund, limafund, jólahald ella tílíkt. Sjálv viðurkenningin kann vera alt frá einum skreytblaði og nøkur góð orð, til eina gávu, blómur ella pening. Tað er upp til felagsskapin. Tað týdningarmikla er at persónurin ella bólkurin fáa viðurkenning fyri tað arbeiði tey hava gjørt og hvønn týdning tey hava fyri felagsskapin.

## Matstovur, kaffihús og skeinkistøð

Fjølmentanarvikan er eisini eitt gott høvi at skapa ein góðan stemning í café og býarlívinum. her eru nøkur hugskot til tiltøk ið kunnu gera Fjølmentanarvikuna enn meira hugnaliga og sum kann fáa fleiri fólk at vitja café, mat og skeinkistøð hesa vikuna.

### DJ-kvøld

Fokus á útlendskan tónleik. Eitt nú velja ávísan tónleikastíl ella tónleik úr ávísum landi/heimsparti.

### Dansikvøld

Kom og dansa salsa ella annan dans.

### Karaoke night

Læn eitt karaoke ljóðanlegg og savna fólk at syngja teirra yndisløg.

### Matur og drekka

Serligt mat- og drekkakort til hesa vikuna við íblástri uttan úr heimi.

Hotel og matstovur kunnu bjóða fram matskeið, har fólk sleppa at gera mat við einum kokki ella matkønum persóni og royna at gera mat á ein øðrvísi hátt.

Caféir kunnu bjóða inn til kaffi ella té smakking og fáa ein serkønan at koma at greiða frá hvaðani kaffi/thé stavar, hvat er besti máti at bryggja/trekkja, hvat hoskar væl aftur við o.s.v.

Skeinkistøð, hotel og bryggjaríir kunnu bjóða inn til eitt nú øl, vín ella wiskey smakking. Tiltakið gerst enn meira fjølmentað um hugsað verður um at royna drykkir ymsa staðni frá, og/ella fáa ein serkønan at koma at greiða frá upprunanum, hvat tað hóskar saman við ella líknandi.

Matstovur, skeinkistøð, hotel, heimablídni og onnur áhugaði kunnu gera eitt samstarv um eitt upplivilsi, har ið fólk kunnu keypa eitt atgongumerki ið leiðir tey til ymisk støð í nærumhvørvinum har tey fáa smakkiroyndir av ymiskum forvitnisligum ið førir tey ein gastronomiskan túr rund heimin.

## Mentanarhús, bókasøvn, framsýningarhølir, leikhús, konsertstøð og samkomuhús

Fylgjandi hugskot eru slík ið kunnu nýtast eitt nú í mentanarhúsum, bókasøvnum, framsýningarhølum, leikhúsum, koncertstøðum, samkomuhúsum, ella á øðrum mentanarpallum, har ið hugur er til at varpa ljós á sjølmentan í Føroyum.

### Framløga

Til ber at fáa ein tilflytara at koma at hava eina framløgu um egið heimland. Hettar kann eitt ný tvinnast saman við einum tónleikatiltaki úr saman landi ella heimsparti.

### Til foreldur í barnsburðarfarloyvi

Bókasavn, kirkjur, samkomuhús: Vøggusangir úr øllum heiminum.

### Konsert

Konsert við útlendskum tónleiki ella útlendskum tónleikarum á palli.

### Sjónleikur

Framføra leik við útlendskum leikarum ella framføra ein leik, ið eitt nú hevur aðra mentan sum tema, ella sum á annan hátt varpar ljós á, fagnar og fevnir fjølmentanarligt ríkidømi.

### Open Mic

Fólk fáa høvi til at siga eina søgu, lesa eina yrking, siga okkurt skemt og/ella halda eina røðu. Mikrofonin stendur klár.

### Livandi bøkur

*Living books/livandi bøkur* er máti at hitta útlendingar til eitt opið samskifti. Tað kann skipast á tann hátt, at fólk úr øðrum mentanum enn føroyskari bjóða seg fram sum eina livandi bók. Lánarar kunnu so koma at læna fólkini eina løtu og fáa eitt prát við tey um eitt hvørt, so sum fjølmentan, lívið í Føroyum, lívið í upprunalandinum ella okkurt heilt annað, ið tey vilja vita meira um. Hetta eigur at verða gjørt undir tryggum og hugnaligum umstøðum, eitt nú á bókasavni, í mentanarhøli, kafé ella annað.

Eitt gott hugskot er at gera eitt „kaféumhvørvi", har ið fólk kunnu sita við borð tvey og tvey, ímeðan bókin verður lisin (tá ið samrøðan fer fram). Til ber at gera eina permu til bókina áðrenn tiltakið við navni á persóninum og kanska eini yvirskrift ella stikkorðum við evnum, ið „bókin" hevur hug til at siga frá. „Bókin" kann altíð velja at siga nei, um tað er okkurt, ið tey ikki vilja siga øðrum. Tað er umráðandi, at eini tvey fólk eru til staðar og syrgja fyri, at tiltakið riggar, sum tað skal, og greiðir lánarum frá, hvussu hetta fer fram.

## Framførslur

Útlendingar búsitandi í Føroyum fáa høvi til at framføra ymiskt, sum litað verður av teirra mentan. Dømi um framførslur:

- Dansur
- Sjónleikur
- Yrkingaupplestur
- Tónleikur
- Spæla løg við ljóðføri
- Syngja
- Gykl
- Stand-up
- Framløga hjá tilflytaranum um teirra heimland

## Framsýningar

Framsýning, ið vísir á mentanirnar, ið eru í kommununi.

Barnalist, har børn og ung gera list, ið hevur eitt ávíst tema. Eitt nú kann *Fjølmentan* verða eitt tema ella okkurt heilt einfalt, so sum nøvn úr ymiskum londum ella líknandi

Framsýning við lutum og list úr einum ella fleiri londum, ið eru umboðað í kommununi.

Listafólk úr øðrum londum sýna sína list fram.

Listaframsýning við ávísum tema sum tilflyting, fjølmentan ella líknandi.

## Hugnakvøld

Hugnakvøld í sambandi við *Fjølmentanarvikuna* kunnu haldast:

- Í skúlanum
- Á dagstovninum
- Á arbeiðsplássinum
- Í mentanarhúsi
- Á kafé (Kafé Lingua)
- Í frítíðarvirksemi
- Í samkomu
- Í kirkjuni
- Í ítróttarfeløgum

# Partur 2

FJØLMENTANARVIKAN
MULTICULTURAL WEEK

# Børn og ung

## Til dagstovnar og skúlar

Høvuðsendamálið við ítrivunum í hugskotsskjáttuni er at hava tað stuttligt saman, meðan vit gera okkurt øðrvísi, enn vit eru von. Vit kunnu brúka spøl úr øðrum mentanum, ella úr Føroyum. Um luttakarar eru, úr aðrari mentan, so kunnu tey eisini spyrja foreldur ella ommur og abbar, um tey minnast okkurt spæl úr sínum heimlandi. Uppskotini eru býtt upp eftir, hvørt tey leggja dent á rørslu, at grunda ella at skapa, tó hava tey flestu spølini eina samanseting av øllum. Eisini eru uppskot, ið vit kalla: *Til øll.* Øll uppskotini leggja upp til samstarv. Í hugskotskjáttuni er eisini eitt arbeiðsskjal, ið kann nýtast sum hjálp, til at leggja tiltøkini til rættis.



# Rørsla

# Dansimálspæl á swahili

Spælið leggur upp til, at luttakararnir hava tað stuttligt á einum fremmandum máli, venur minnið og viðbragd.

## Vegleiðing til spælið

Eitt barn er dansilærarin. Dansilærarin, ella ein vaksin, lesur hesar setningarnar upp á swahili:

**Tuungane**: Vit standa saman.
**Tucheze**: Vit fara at dansa.
**Tufurahi**: Vit eru glað.
**Tusherehekehe**: Vit halda veitslu.

Vit velja eina rørslu at gera, ið lýsir hvønn setning. Øll mugu gera somu rørslu.

## Dømi

**Tuungane:** So fara øll í runding, ella øll gera eitt hjartatekn við hondunum.
**Tucheze**: Øll dansa tað, tey hava hug til, ella dansa eina serliga rørslu.
**Turfurahi**: Øll klappa.
**Tusherehekehe**: Øll seta seg á gólvið.

Dansilærarin rópar eitt av orðunum upp, og tá skulu hini gera ta rørsluna, ið tey hava valt frammanundan at hoyra til orðið. Um ein ger skeiva rørslu, so má ein úr spælinum. Spælt verður, til bara ein luttakari er eftir, og tá hevur viðkomandi vunnið og sleppur at vera dansilærari í næsta spæli. Til ber at gera spælið til tónleik, og viðmælt verður, at nýta tónleik við rytmum.

Eru børnini lítil, er kanska nóg mikið við 2–3 orðum, og ein vaksin kann vera dansilærari. Fleiri orð kunnu koyrast upp í, um børnini eru størri. Er ein luttakari, ið tosar eitt annað móðurmál, kann spælið gerast á teirra máli. Tá spælið er liðugt kunnu luttakarar grunda á fyrimunir av at duga fleiri mál.

# Føroyskur dansur

Vel eina vísu ella kvøði, har søgugongdin fer fram úti í heimi. Venjið stevini og dansa.

Tosa um hvar hettar staðið er ella var. Hvaðani stavar vísan ella kvæðið. Hvaðani stavar ringdansurin. Hvar aðrastaðni í heiminum verður dansað á líknandi hátt sum í føroyum.

Eitt av teimum lættaru kvæðunum er Ólavur Riddararós. Søgan er bygd sum eitt ævintýr um kærleika, gand og sorg.

Dømi um kvæði:

Sinklars vísa

https://www.youtube.com/watch?v=DXN1c11ZyqI&list=PLiudXX3HV5QIsK5sHs4T6Hd7Da1IQv0vf&index=3

Runsivalstríðið

https://www.youtube.com/watch?v=sg_418mWCJE&list=PL77n0tRlfGe-hFko3LN5yskbiike5aoZx&index=11

Bøhmerlandsdronningen:

https://www.youtube.com/watch?v=x98jaVg376k&list=PL77n0tRlfGe-hFko3LN5yskbiike5aoZx&index=28

# Kho kho

*Kho kho* er eitt barna og ungdómsspæl úr India. Spælið leggur upp til, at luttakararnir venja samskifti og „strategi" – leggja til rættis – og samstundis fáa rørt seg. Gott er at hyggja at viðhefta leinkinum, ið týðiliga lýsir strategipartrin.

## Vegleiðing til spælið

Tekna ein stóran ferhyrning upp á einum vølli, umleið 30 x 15 m við einari linju í miðjuni á langsíðuni og einum pela við báðar endar á miðlinjuni. Tvey lið við níggju luttakarum í hvørjum. Talið kann broytast, bólkarnir skulu tó vera líka stórir. Annað liðið fangar, og hitt liðið verjir. Sí mynd 1 og 2.

**1.** Fyrst fer annað liðið inn á vøllin, og tað er liðið, sum fangar og verður kallað fangaliðið. Átta luttakarar frá fangaliðnum seta seg at húka á miðlinjuni. Fýra venda andlitinum annan vegin, og fýra venda hin vegin, og tey sita soleiðis, at tey venda annahvørt, hvør sín veg, við líka millumrúmi. Ein luttakari stendur við annan pelan á aðru síðuni. Sí mynd 2.

**2.** Tríggir luttakarar úr verjuliðnum koma inn á vøllin og stilla seg øðrumegin linjuna. Nú skulu tey, ið sita, royna at fanga tey, ið verja, við at nerta við tey. Luttakararnir á verjuliðnum kunnu renna ímillum luttakarnir á miðlinjuni. Luttakarin, ið fangar, kann ikki renna ígjøgnum miðlinjuna og kann ikki venda við og renna hin vegin, men skal yvir um pelan í hinum endanum.

**3.** Sí mynd 3, 4 og 5.

**4.** Luttakarin, ið fangar, kann fáa ein annan luttakara á sínum liði til at fanga fyri seg. Fangarin kann renna yvir til ein luttakara, ið vendir bakið til, rópa Kho og prika tann luttakaran á ryggin. So býta tey um pláss, so tann prikaði luttakarin reisir seg og rennur út á ta hálvuna, sum viðkomandi vendir móti. Sí mynd 6 og 7.

**5.** Tann prikaði luttakarin skal renna út á ta hálvuna, hann vendir móti. Hann kann tó renna um pelan í endanum og yvir á hina hálvuna.

**6.** Tá ið øll trý børnini, ið verja, eru fangað, koma trý nýggj inn á vøllin.

**7.** Tá ið allir luttakararnir á verjuliðnum eru fangaðir, býta liðini um. Minst til at taka tíð. Vinnarin er tað liðið, ið hevur nýtt stytst tíð at fanga mótstøðuliðið.

Leinkja til Kho Kho:

https://www.youtube.com/watch?v=kD-D6QWDn7k



Mynd 1



Mynd 2



Mynd 3



Mynd 4



Mynd 5




Mynd 6



Mynd 7

# Virðisspæl

Spælið leggur upp til samstarv og at luttakarnir grunda á egin virði, og hvat tey merkja í samspæli við onnur menniskju.

## Vegleiðing til spælið

Vit skulu nýta 19 endurnýtslutir, so sum plastikfløskur, plastikkoppar, tíðindabløð o.s.fr. Øll taka okkurt við heimanífrá. Vit skriva virðir á hvønn lut: eydna (happiness), vinalag (friendship), ríkidømi (wealth), framburður (success), andligleiki (spirituality), borgari (citizenship), mæti (fame), trúvirði (autenticity), vald ( power), ávirkan (influence), heiðurssemi (integrity), rættvísi (justice), gleði (joy), kærleiki (love), viðurkenning (recognition), familja (family), sannleiki (truth), vísdómur (wisdome), ting (status).

Eisini skulu vit nýta tveir posar, tvey turriklæði (at binda fyri eyguni) og pappír og penn til hvønn luttakara. Vit skulu nýta væl av plássi til spælið. Tveir líka stórir bólkar skulu gerast. Liðini venda hvør móti øðrum, við einum millumrúmið á umleið 10 fet. Hvørt lið velur ein samlara, og viðkomandi fær bind fyri eyguni. Eisini skal ein skipari veljast. Skiparin leggur allar lutirnar á gólvið millum bólkarnar.

Nú skulu samlararnir royna at samla so nógvar lutir sum møguligt, við bindi fyri eyguni. Fyrst annað liðið og síðani hitt. Skiparin tekur tíð, og eftir 3 min. skulu liðini skifta samlara.

Teirra liðfelagar skulu royna at hjálpa teimum at samla, við at geva teimum leiðbeiningar, til dømis: „eitt sindur til høgru, beint við fótin, eitt sindur fram“, o.s.fr. Mótstøðuliðið kann geva skeivar vegleiðingar samstundis. Tann bólkurin, ið samlar flest lutir skjótast, hevur vunnið. Hvørt lið hevur trý umførð og fær 5 min. til hvørt.

## Hvar er mynturin?

Spælið *Hvar er mynturin*, er eitt spæl, ið varð brúkt á altjóða skótalegu í 2011. Endamálið við spælinum er at venja samskifti, samstrarv, at geva gætur og hugsa strategiskt (leggja til rættis).

### Vegleiðing til spælið

Luttakararnir verða býttir í tveir bólkar. Bólkarnir seta seg niður í tvær javnfjarar linjur og venda andlit til andlits. Hvør bólkur fær ein mynt.

Byrjað verður úr øðrum enda, og mynturin skal ganga allan vegin oman í hin endan. Luttakararnir kunnu tó steðga myntinum og bara látast, sum at hann verður givin víðari, og tá skal restin av luttakarunum í bólkinum látast, sum at mynturin gongur allan vegin oman í hin endan.

Hendurnar hjá øllum skulu vera framman fyri kroppin. Bólkarnir gera hetta í senn, og uppgávan hjá luttakarunum er at halda eyga við luttakarunum í hinum bólkinum.

Tá ið spælið er liðugt, skulu bólkarnir samlast og royna at gita, hvar mynturin hjá hinum bólkinum endaði – t.v.s. hvør í hinum bólkinum hevur myntin.

Luttakarnir hava tríggjar minuttir at ráðføra seg í, so skulu teir hava eitt „git" klárt. Um bólkarnir gita rætt, fáa teir eitt stig. Tá ið bólkarnir ráðføra seg, skulu teir eisini royna at leggja til rættis, hvussu best ber til at halda eyga við mótstøðuliðnum fyri at finna út av, nær mynturin steðgar.

Øll seta seg aftur sama stað, og tann fyrsti í hvørjari linju setur seg nú við endan. Spælið verður so endurtikið, og tá øll hava verið fyrst, er spælið liðugt. Tann bólkur, ið hevur flest stig, hevur vunnið.

# Jerusalema Dance Challenge

Jerusalema dansurin er upprunaliga úr Eysturafrika. Dansibólkurin Fenómenos do Semba úr Angola gjørdi í 2020 eina videoupptøku, meðan tey dansaðu til sangin Jerusalema hjá afrikanska framleiðaranum Master KG. Síðani hevur dansurin ferðast um allan heim, sum ein avbjóðing við #Jerusalemadancechallenge. Sí leinki. Sjálvur dansurin hevur verið dansaður í Eystur-Simbabwe í øldir og snýr seg um at liva saman.

## Vegleiðing til dansin

**1.** Fýra veiggj við vinstru mjødn, fýra veiggj við høgru mjødn,

**2.** traðka skiftivís vinstra, høgra fýra ferðir á staðnum,

**3.** gakk fýra fet fram, vinstra fyrst, síðani snara vit vinstru um og gera eitt spark til síðuna við vinstra beini, snara vinstru um og gakk trý fet til síðuna, og fjórða fet er eitt spark til høgru,

**4.** fýra fet á staðnum, og so endurtaka vit. Vit venda tann vegin, vit standa, ella venda frameftir aftur og byrja umaftur.

Vit kunnu klappa eitt klapp, árðenn vit byrja at veiggja og tá ið vit skifta til at veiggja høgru

Vit endurtaka fleiri ferðir inntil øll eru við. Minst til, tað snýr seg um at vera saman og hava tað stuttligt. Best er at læra fetini uttan tónleikin fyrst – og síðani dansa til tónleik. Hugsa um at byrja „rætt" til tónleikin. Intro er fýra ferðir átta taktir (dansi-taktir, t.v.s. fýra ferðir fýra tónleikataktir).

Tað fyrsta leinkið vísir trinini, og hini leinkini vísa teir ymisku hættirnar, ið dansurin hevur ferðast runt heimin.

https://www.youtube.com/watch?v=9jR1NDFpLT0

https://www.youtube.com/watch?v=qDMZRIO9Uy4

Filma framførsluna og send inn til okkara á: **fjolmentan@gmail.com** ella deil á sosialu miðlum við **#fjølmentanføroyar**

## Tinikling

Tinikling er ein filipinskur fólkadansur, ið verður dansaður við bambusrørum. Dansurin varð uppunaliga dansaður til Rondalla tónleik, ið stavar úr Spania, men í dag verður Tinikling dansaður til nútímans tónleik. Nógvar ymiskar útgávur av dansinum eru at finna á alnetinum. Tinikling snýr seg um rytmu, stev og koordinatión. Tinikling er ikki til heilt smá børn. Til dansin skulu nýtast tvey til fýra bambusrør á uml 3 m ella onnur løtt rør ella stengur.

Sí leinki til íblástur:

https://www.youtube.com/watch?v=6ZMyFiaAGNg

https://www.youtube.com/watch?v=9EvmEPahwEg

https://www.youtube.com/watch?v=8HC4vIkiAMs





# Grunda

## Fjølmentanarbingo

Fjølmentanarbingo snýr seg um samskifti og at fáa innlit í lívið hjá hvørjum øðrum, á ein lættan og stuttligan hátt.

**A.** Hetta spælið leggur upp til, at luttakararnir koma at kennast betur

**B.** Hetta spælið leggur upp til, at luttakararnir kappast um at minnast ymiskt um hvønn annan.

## Vegleiðing til spælið:

Luttakararnir fáa eina plátu í part og skulu hava hvør sín blýant ella penn. Á plátunum eru 25 puntar, og á hvørjum punti er ein persónslýsing. Dømi: „Eg eigi eitt kelidjór", ella „Mær dámar væl at kappast". Luttakararnir skulu ganga runt í rúminum og spyrja hvønn annan spurningar frá plátuni. Um tey fáa eitt „ja", so skal viðkomandi, sum svarar, skriva sítt navn á puntin við tí persónslýsingini. Loyvt er bert at spyrja hvønn persón ein spurning í senn. Tann, ið fyrst hevur fulla plátu, rópar *BINGO* og hevur vunnið spælið.

Sí íblástur:

snar.fo/lond

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Dámar væl tónleik | Dámar at dansa | Eigur eitt kelidjór | Dugir minst fimm høvuðsstaðir | Kennir onkran væl, ið tosar eitt annað mál enn føroyskt |
| Dugir at binda | Dámar sterkan mat | Dámar at kappast | Hevur ferðast í einum øðrum heitum landi | Elskar at ganga grýlu |
| Hevur familju úr øðrum landi | Dugir at syngja ein tjóðsang | Gongur til ítrótt | Kennir onkran, sum ikki er fødd/ur í Føroyum | Hevur verið uppi til klokkan eitt um náttina |
| Hevur roynt at fiska | Dugir at spæla eitt ljóðføri | Er elst av sínum systkjum | Fær altíð sjóverk | Hevur einaferð etið bomm til morgunmat |
| Hevur lisið meira enn tríggjar bøkur | Hevur føðingardag sama dag sum tú | Dugir at tosa eitt annað mál enn føroyskt | Dugir at telja upp í 10 á trimum ymiskum málum | Dámar at tekna |

**Plátan:** prenta út og klipp

## Minnisspæl
Tá ið Fjølmentanarbingo er liðugt, ber til at gera eina spurnakapping, har øll eru móti øllum. Lærarin samlar inn pláturnar hjá luttakarunum og fær sær eina nýggja. Síðani spyr lærarin luttakararnar teir spurningar, ið standa á puntunum. Luttakararnir rópa „HEP“, um teir vita svarið, og tann, ið rópar fyrst, sleppur at svara. Navnið á tí, ið svarar, fer á puntin. Luttakararnir hava ikki loyvi at svara um seg sjálvar, men bert um onnur. Tann næmingur, ið svarar flest spurningum, (minnist best, hvør hevur svarað hvat), hevur vunnið. Møguliga eru fleiri, ið hava svarað somu spurningum. Luttakarin, ið fyrstur sigur „HEP“, skal bert minnast eitt rætt navn til hvønn spurning.

## Flagg og lond
Hetta spælið er í tveimum pørtum: ein lættari til yngru luttakararnar og ein djúpri, til eldru luttakararnar. Endamálið er at læra um fyribrigdið tjóð, og at luttakarnir grunda á, at vit eru øll eisini partur av einum størri høpi, umframt familju, vinir og felagsskapir annars.

**A.** Spælið leggur fyri við at læra, hvat eitt flagg er, og fáa íblástur til at gera sítt egna flagg.

**B.** Spælið leggur síðani upp til, at bólkarnir skapa eina nýggja tjóð; gera nýtt flagg, tjóðbúna, tjóðdans, bólkaróp og nakrar setningar á nýggjum máli. Til ber eisini at velja leiðara á demokratiskan hátt o.s.fr.

Luttakararnir tekna eitt flagg úr sínum heimlandi ella upprunamentan. Fløggini verða hongd upp í rúminum. Skipað fyri spurnakapping ella kahootkapping, ið leggur fyri við at luttakararnir skulu gita, hvørji lond fløggini hoyra til. Um til dømis bara nøkur fá eru úr øðrum landi, so kunnu luttakararnir tekna eitt og hvørt flagg, ið tey finna, og síðani lesa eitt sindur um landið, ið flaggið umboðar. Eisini ber til at gera spurningar, sum til dømis hvønn heimspart flaggið hoyrir til, umleið hvussu nógv fólk búgva í tí landinum, og hvat mál tey tosa.

Grunda á, hví vit hava fløgg, hvønn týdning fløgg hava, um teirra litir ella okkurt á flagginum umboðar okkurt serstakt við mentanini, sum tey umboða. Til ber at gera bólkar, ið hava sum uppgávu, at gera eitt nýtt flagg í part – eitt flagg, sum ikki finst í veruleikanum – til dømis við at ímynda sær, hvørji fløgg planetir kundu havt, ella bara nýta hugflogið annars. Til ber eisini at gera bólkar, ið umboða nýggj lond, og harvið, umframt at gera sær fløgg, kunnu bólkarnir t.d. finna upp á mál (nøkur orð, ella setningar), gera eitt bólkaróp, tekna ein tjóðbúna, finna upp á ein tjóðardans og velja leiðara, á demokratiskan hátt. Spælið kann leggjast til rættis eftir aldri og tíðarrúmi.

Íblástur er at finna inni á:

snar.fo/lond

# Matur

Endamálið er at skilja, hvat matmentan er, og at matmentanir eru ymiskar í ymiskum londum, bæði viðvíkjandi fyrireiking og sosialt. Spælið kann gerast á ymiskan hátt, og nøkur uppskot eru her. Til ber at gera fleiri uppskot, um tað til dømis verður gjørt sum ein evnisdagur, ella fleiri ferðir somu viku. Krevur nakað av fyrireiking.

## Vegleiðing til spælið

Leggið eina løtu ella ein dag til rættis, ið snýr seg um mat.

**A.** Luttakararnir sleppa at hava mat við, møguliga ein rætt, ið best umboðar teirra mentan, húsarhald, ella bara okkurt, ið teimum dámar. Eisini kunnu luttakararnir gera mat, ið er øðrvísi enn tað, tey eru von við.

**B.** Til ber at finna myndir av rættum á netinum og tosa um sambandið millum umhvørvið, veðurlag og mat. Vís á hvat slag av mati ella kryddarí er sermerkt fyri matmentanir aðrastaðni.

**C.** Ger eina spurnakapping um mat, har luttakararnir skulu gita, hvør matur / hvørjir rættir úr hvørjum landi. Hetta kann gerast við myndum.

**D.** Lat luttakararnir fara í bólkar og gera hvør sín heimildarfilm um mat. Bólkarnir kunnu gera samrøður um mat við fólk úr øðrum mentanum. Spurningarnir kunnu møguliga snúgva seg um, hvat matur hevur at siga fyri tey, og hvussu tey uppliva matmentanina í Føroyum.

Tann sosiali parturin av matmentanini hevur eisini stóran týdning, so sum hvussu nógv tíð fer við at gera mat, og hvat matur hevur at siga fyri familjuna ella felagsskapin. Grunda á hvat fyri leiklut matur hevur í lívinum hjá okkum, hvat vit læra av at gera mat saman, og hvat vit kunnu læra av matmentanum aðrastaðni. Til dømis er matur ein háttur at vísa kærleika og umsorgan í fleiri mentanum.

Á arbeiðsplássum ber til at skipa fyri, at fólk kunnu taka mat við til onnur at royna, ella kantinan ger okkurt øðrvísi hendan dagin.

# Málspæl
Endamálið er at eggja til forvitni fyri øðrum málum og mentanum.

## Vegleiðing til spælið
Spælið leggur fyri við at læra at siga „hey“ ella „góðan dag“ á so nógvum ymiskum málum sum møguligt. Fyrst vita vit, um onkur luttakari dugir annað mál enn føroyskt. Tann luttakarin lærir fyrst hini at siga „góðan dag“ á sínum máli. Síðani vita vit, hvussu nógv onnur mál vit duga, og hvussu vit siga „góðan dag“ á teimum málunum. Vit kunnu arbeiða tvey og tvey ella trý og trý.

At enda hava vit ein lista, ið vit seta saman. Klára vit at siga „hey“ ella „góðan dag“ á 10 ymiskum málum? 20 ymiskum málum?

Vit skriva øll orðini á pappír og heingja runt í rúminum. Vit kunnu tekna flagg og skriva navnið á viðkomandi landi, á hvørt pappír. Til ber at gera spurnarkapping um orðini aftaná, har eitt lið spyr: „Í hvørjum landi siga tey *Hola*“, og hitt svarar. Soleiðis fáa vit eisini vant tey orðini umaftur, ið vit hava arbeitt við.

Tá ið uppgávan er liðug, kunnu luttakararnir grunda á týdningin at skilja tað málið, ið fólk tosa rundan um teg. Hvat eru vansarnir við ikki at skilja? Hvussu ber til at hjálpa einum, ið ikki skilur føroyskt?

# Søgur og sagnir
Fyrireika ein tíma, dag ella eitt kvøld við søgum og sagnum úr ymiskum mentanum. Bjóða møguliga einum foreldri, ommu ella abba, sjónleikara ella upplesara annars, at lesa fyri luttakarunum. Grunda á um felags eyðkenni eru í teimum ymisku søgunum, ella hvørt søgurnar eru ein samanblanding av øðrum, tit kenna áður. Slíkt kann lættliga gerast sum partur av einum hugnakvøldi ella flokstíma.

# Duolingokapping
Tað finnast nógvar appir, ið børn eru von at nýta á telefonini. Hesa vikuna kunnu vit gera eina kapping, har flokkurin velur eitt fremmant mál at læra seg, eitt nú við appini Duolingo. Til ber at velja eitt mál, ið ein av luttakarunum tosar heima, til dømis. Tá ið vikan er farin, duga luttakararnir nøkur orð á málinum hjá viðkomandi, og møguliga er áhugi kveiktur fyri at læra mál yvirhøvur.

Leinki:

duolingo.com

## Kahootkapping

Nýtið Kahoot ella aðra app til at gera eina vanliga spurnakapping. Evnið kann vera eitt nú høvuðsstaðir, lond, heimspartar, fløgg, djór ella annað, ið lærir luttakararnar um umheimin.

Leinki:

kahoot.com

## Kafé Lingua

Kafé Lingua er málkafé, ið leggur dent á, at fólk, ið tosa fleiri mál, hittast og samskifta. Endamálið er at práta um lívsstíl og mentan á ein gerandisligan og hugnaligan hátt.

Leinki:

cafelingua.com

## Kanningararbeiði

Til eldru flokkar er hóskandi at gera kanningararbeiði. Leita fram hagtøl úr hagtalsgrunninum hjá hagstovuni fyri at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu føroyska samfelagið er samansett. Til ber at finna út av, hvørji lond eru best umboðað í Føroyum. Til ber at leita eftir ríkisrættarstøðu og gera uppgávu út frá upplýsingunum.

## Bøkur

Kannið hvørjar bøkur eru umsettar til føroyskt úr øðrum enn teimum norðurlendsku málunum. Lesið eina bók ella stuttsøgu eftir rithøvund, ið lýsir aðra mentan ella er úr aðrari mentan.

## Heimurin

Printa eitt heimskort út. Luttakararnir skulu síðani seta ein prikk, ella eina nál, á tey lond, sum teirra foreldur eru úr. Hetta kann eisini gerast við einum føroyakorti og bygdum í Føroyum, um eingin í bólkinum hevur útlendska bakgrund. Eisini kunnu luttakarar velja eina ávísa litkotu fyri at visa, hvørjum londum luttakararnir hava áhuga fyri at vitja ella vita meira um. Hesa vitanina ber til at brúka sum ein inngang til víðari tilrættislegging fyri undirvísing í eitt nú landalæru, køki, tóneiki, átrúnaði o.s.fr.

Leinki til íblástur:

snar.fo/lond

## Stavrøð

Býtið næmingar í bólkar og gev hvørjum bólki eitt øðrvísi starvrað. Eitt nú kyrilliskt, rúnir, hieroglyffir ella koreanskt. Eitt stavrað til hvønn bólk. Bið næmingarnar um at skriva sítt navn við hesum stavunum. Síðani býta tey um, har tey eitt nú skulu skriva sítt eftirnavn, ella okkurt annað.

Tá tey hava roynt seg við øllum stavrøðunum, so kunnu øll nøvnini verða blandaði. So skulu øll taka eitt navn út rúgvuni og fara til stavrøðini at finna útav hvat navnið er, ella hvat stendur á lepanum. Tak støði í aldrinum hjá børnunum. Uppgávan kann eisini gerast listarlig, soleiðis at fokus er á kalligrafi og børnini royna seg við penslum, ella fjøðurpenni á vakurt papír.

Tey kunnu royna seg við kalligrafi frá eitt nú Kina, Teilandi ella Japan.

Rúnir:

https://www.pinterest.dk/pin/1145743961423897506/

Hebraiskt:

https://www.pinterest.dk/pin/189432728071737992/

Braille (blindskrift)

https://www.pinterest.dk/pin/505248270574916l9/

Grikska stavraðið:

https://www.pinterest.dk/pin/482096335115285461/

Kinesiskt:

https://www.pinterest.dk/pin/331437472492609 47/



# Skapa

# Vit gera list saman

List er ein framúr háttur at styrkja sambandið millum menniskju og samstundis víðka fatanarevnið hjá tí einstaka. Endamálið er, at fáa eina nýggja mynd burtur úr teimum einstøku og grunda á, hvat tað merkir at liva saman við øðrum, hvat vit kunnu læra av tí, tosa um fyribrygdi íblástur, og hvat fær sambond millum menniskju at rigga væl.

## Vegleiðing til spælið

Luttakararnir tekna, mála ella finna eina mynd, ið lýsir okkurt serligt frá teirra mentan ella upprunamentan. Tað kann vera alt frá einum djóri, blómur ella klæðir, til okkurt, ið lýsir eina kenslu. Legg tær í geyma, at um so ein luttakari hevur foreldur úr øðrum landi, kann viðkomandi væl kenna seg sum føroying og í slíkari uppgávu velja okkurt úr føroysku mentanini.

Luttakararnir greiða frá, hvat tey hava valt at tekna og hví. Síðani kann lærarin gera bólkar, ið hava sum endamál at gera eina stóra mynd burtur úr einstaklingamyndunum. Antin kunnu tey klippa og líma partar av einstaklingamyndunum á eina stóra flatu ella tekna og mála sama skap umaftur á ta stóru flatuna.

Luttakararnir skulu framleiða stuttfilmar við tilfari, ið lýsir og fagnar fjølmentanini í Føroyum. Átakið kann byrja við, at bólkurin sjálvur ger leiðbeiningar til stuttfilmarnar, so sum um longd, útgerð og góðskustig. Eisini kann bólkurin velja eina dómsnevnd, ið skal meta um filmarnar. Hetta kann vera partur av verkætlanini, so luttakararnir læra at vera við í einari skapandi mannagongd, ið er treyta av nøkrum einføldum leiðbeiningum.

# Myndir

Luttakarar kunnu vísa ella tekna myndir av djórum, blómum ella øðrum, ið lýsir ymiskar mentanir. Um luttakarar eru úr øðrum mentanum enn tí føroysku, kann teirra mentan vera evni, og møguliga kunnu tey greiða frá sínum heimlandi ella heimlandinum hjá sínum foreldrum. Eisini ber til at gera eina myndakapping, ið lýsir eina ella fleiri ymiskar mentanir.

# Tónleikur

Luttakararnir læra sangir, rytmur og/ella tónleikabrot úr øðrum mentanum. Til ber at gera nýggjan tónleik, ið er ein blanding av rytmum, sangi og løgum úr fleiri ymiskum mentanum.

## Dansur

Luttakararnir læra dansistev saman. Ymiskar mentanir hava ymiskar dansir, ið til ber at læra og dansa saman. Kannið, hvussu nógvar fólkadansir tit finna og dansa saman. Um onkur í flokkinum er úr aðrari mentan, er sjálvsagt at hugsa um hvørt tað er ein møguleiki, at læra okkurt frá teimum. Eisini ber til at finna okkurt brot á Youtube ella TikTok, ið er hóskandi fyri bæði ung og eldri at dansa saman.

## Sjónleikur

Finn ein leik, ið leggur dent á fjølmentan ella at vera fremmandur í eini mentan. Eisini ber til at skriva ein leik, ið leggur dent á fjølmentan. Leikurin kann skrivast burtur úr eini veruligari hending, antin úr heimssøguni ella persónligari søgu hjá onkrum, ið tit kenna. Til ber eisini at gera stuttlig spøl, ið nýta sang og dansivenjingar sum upphiting til sjónleikavenjingarnar.

## Framførslur

Fyrreika tónleik, sjónleik, dans, sang ella at siga søgur úr ymiskum mentanum og bjóða foreldrum ella starvsfeløgum til framførslu. Hetta kann gerast í sambandi við eitt hugnakvøld ella sum alment tiltak.

Vinarliga takið myndir av tiltøkunum og leggið út við **#fjølmentanføroyar**

Um tiltøkini eru almenn, so sendið endiliga inn á **fjolmentan@gmail.com** so koma tey á skránna.



ØII

## Hugnakvøld

Í skúlum ella á stovnum: Skipa fyri einum hugnakvøldi ella degi, har foreldur sleppa at síggja tað, sum børnini hava arbeitt við í fjølmentanarvikuni. Um okkurt barn hevur foreldur úr útlendskari mentan, ber til at bjóða teimum at greiða frá, hvussu tað er at ganga í skúla í teirra heimlandi, ella onkrum øðrum, ið kann hava áhuga fyri børn.

### Á arbeiðsplássum

Skipa fyri starvsfólkadegi, sum hevur mat sum evnið. Um starvsfólk eru úr øðrum londum, so hava tey møguliga áhuga at gera mat, syngja ella siga søgur og sagnir úr sínum heimlandi. Eisini ber til at bjóða vinnurekandi úr øðrum mentanum at greiða frá sínari lívsleið.

### Í ítrottarhøpi

Skipa fyri hugnakvøldi ella degi við luttakarum, ið greiða frá síni ítróttarmentan, ella luttakararnir spæla okkurt spæl í upphitingini.

Endamálið er at vera saman um okkurt, ið vísir á mentanarligt fjølbroytni á ein hugnaligan hátt. Hugnakvøld nýtast ikki at vera so rúgvusmikil, bara hava okkurt viðkomandi á skránni, ið fólk kunnu vera saman um. Hugsa um at bjóða tulki við um neyðugt.

## Heimablídni

Møguliga hevur onkur hug at gera mat úr egnum landi og bjóða vinfólki, starvsfelagum ella eini familju heim at royna. Ella onkur velur at gera ein rætt úr aðrari mentan, ið tey eru hugtikin av og hava hug at royna.

# Orðaskifti

## Í skúla, arbeiðsplássi, frítíðarfelagsskapi ella aðrastaðni.

Skipa fyri orðaskifti við evninum *Mentanarligt fjølbroytni*.

Spurningar kunnu vera:

- Hvat er mentan?
- Hvat er føroysk mentan?
- Hvat er mentanarligt fjølbroytni?
- Hvussu eru vit í Føroyum lík øðrum mentanum, og hvussu eru vit ólík?
- Hvat er fyrimunurin við mentanarligum fjølbroytni?
- Hvat er tilflyting?
- Hvat kunnu avbjóðingarnar vera hjá tilflytarum í Føroyum?
- Hvat kunnu vit gera fyri at fáa tilflytarar at at kenna seg heima í flokkinum? Í skúlanum? Í Føroyum?

Um kjakið er í flokkinum, so er týdningarmikið at minnast, at um tilflytarar eru millum næmingarnar, so kann kjakið vera kensluborið fyri tey. Um luttakararnir eru ung fólk, so er týdningarmikið, at lærarin ella orðstýrarin er fyrireikaður at vegleiða kjakið. Eitt gott hugskot er at arbeiða í smærri bólkum.

Endamálið er at læra um mentanarligt fjølbroytni, at læra meira um hvønn annan og eisini at læra at seta orð á og virða hugleiðingar um aðrar mentanir og egna mentan.

# Innbjóðing til fjølmentanartiltak

Í sambandi við fjølmentavikuna vilja vit fegin bjóða

til eitt tiltak hjá

Addr.

Dato Klokkan

*Vit vóna at síggja teg/tykkum og vóna,*
*at vit fáa ein góðan dag/kvøld saman.*

**Við fjølmentanarkvøðu**

# Lat okkum byrja!

Hetta skjalið er ætlað sum ein hjálp til at leggja tykkara átak ella virksemi til rættis í sambandi við fjølmentanarvikuna. Printa út og brúka eftir tørvi.

## Leggið tykkara virksemi til rættis

Set X

- Hava tit valt tykkara tiltak?
- Hava tit grundað á, hvørt tað hóskar til aldursbólkin, ella um tað skal lagast til?
- Hava tit boðað teimum luttakandi frá, at tiltakið verður?
- Hava tit grundað á, hvørt tiltakið kann leggja upp til meira undirvísing ella spæl?
- Hava tit tryggjað tykkum, at hølið ella økið er tøkt?
- Hava tit tryggjað tykkum, at nóg mikið av tíð er til tiltakið?

## Gerið vart við tykkum

- Takið myndir av tiltakinum og leggið út á sosialu miðlar við **#fjølmentanføroyar** ella send inn á **fjolmentan@gmail.com**

## Lat okkum tosa saman

- Skriva á **fjolmentan@gmail.com** við møguligum uppskotum til virksemi.

- Far inn á heimasíðuna hjá Torshavn.fo ella skriva á **fjolmentan@gmail.com** fyri at fáa meira at vita um fjølmentavikuna.

## Er tiltakið alment?

- Hava tit sent inn upplýsingar um tiltakið á fjolmentan@gmail.com ?
- Hava tit kannað, at tiltakið er á yvirskipaða kalendaranum fyri fjølmentanarvikuna?

*Er nakað ivamál, ella vilja tit bara práta eitt sindur um møguleikar og hugskot, so ringið á 271048 ella skrivið á fjolmentan@gmail.com. Vit gleða okkum at hoyra frá tykkum!*

# Skreytskjal

Takk fyri tína luttøku á
Fjølmentanarvikuni 2023

Navn ______________________________

**Við fjølmentanarkvøðu**

______________________________

Multicultural Week Fjølmentanarvikan

## Viðmerkingar

## Keldulisti:

cia.gov

snar.fo/lond

Integration.fo

https://integration.fo/tilfar

https://www.un.org/en/observances/cultural-diversity-day

https://unesdoc.unesco.org/ark:/48223/pf0000382874/PDF/382874eng.pdf.multi.page=6&zoom=auto,-16,797

https://www.griffith.edu.au/whats-on/multicultural-week

https://education.uw.edu/cme/view

Multicultural Week Fjølmentanarvikan

#fjølmentanføroyar